## VALGREINAR

# Framá Landssjúkrahúsið

**Heðin D. Poulsen**
*valevni Fólkafloksins*



Fólkaflokkurin er annað enn vinnulívs- og skattapolitikkur. Fólkaflokkurin fer í komandi valskeiði at leggja stóran dent á mentannar-, almanna- og heilsuviðurskiftir. Omanfyrinevndu málsøkir eru sum oftast við sviðusoð, tá ið skattgjaldarans pengar skulu býtast millum tey ymisku økini. Ein stovnur, sum er serliga illa fyri er Landssjúkrahúsið.

**Landssjúkrahúsið í kreppu**
Í kreppuni vóru nógvar sparingar framdar á Landssjúkrahúsinum, men meðan lønir og útreiðslurnar í samfelagnum annars eru hækkaðar til sama støði, ið tær vóru í 1992, er ov lítið gjørt við at betra um støðuna á Landssjúkrahúsinum.

Sitandi samgonga hevur tó framt fleiri betringar á Landssjúkrahúsinum. Landssjúkrahúsið kann um stutta tíð taka ein nýggjan bygning í nýtslu og hevur fingið játtan at útskifta ávísa útgerð. Hetta er gleðilig framgongd, men enn tørvar Landssjúkrahúsinum eina hjálpandi hond.

Størstiparturin av Landssjúkrahúsinum er í dag niðurslitin. Bæði bygningar og installatiónir krevja stórar ábøtur. Útgerðin sum hoyrir til røktar- og rehabiliteringsøkið er í nógvum førum ótíðarhóskandi og neyðugt er við størri játtan til KT-útbúnaðin, soleiðis at skrásetingar- og kvalitetsskipanir kunnu útbyggjast.

Neyðugt er tískil við meirjáttan til Landssjúkrahúsið í komandi valskeiði.

**Eldssálir møðast**
Starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum hevur alt rós uppiborið. Tey gera eitt megnararbeiðið til tess at betra um heilsustøðuna hjá tí einstaka.

Á Landssjúkrahúsinum kennir ein seg altíð vælkomnan. Fyrikomandi starvsfólk, ið veita góða viðgerð til sjúklingarnar. Men sum orðatakið sigur "eldsálir møðast". Gerst byrðan ov tung, er nemt at falla í fátt.

Tørvur er á fleiri starvsfólkum á Landssjúkrahúsinum. Á operatiónsgongdini eru bíðilistar, av tí at ov fá fólk eru í starvi. Á psykiatrisku deildunum er neyðugt at hava afturlatið ávísar partar av árinum, av tí at ov fá starvsfólk eru. Á fleiri øðrum deildum er arbeiðið ov strongt, tí starvsfólk vænta. Vaktararbeiðið avmaktar starvsfólkið. Hetta sóu vit eitt nú í ósemjuni viðvíkjandi deild B6. Vandi er fyri at tað í longdini fer at ganga út yvir viðgerðina hjá tí einstaka, at ov fá fólk eru í starvi.

**Nú skal tað henda**
Omanfyrinevndu viðurskifti kunnu vit hvørki bjóða sjúklingunum ella starvsfólkinum á Landssjúkrahúsinum.

Vit mugu hava eitt Landssjúkrahús, ið kann mátast við landsdekkandi sjúkrahús í øðrum framkomnum londum. Eitt sjúkrahús, har tann einstaki kennur seg tryggan. Tað er als ikki neyðugt at velja tað óvirkandi donsku loysnina, vel hina føroysku loysnina.

# Vel tey røttu fólkini við teimun røttu hugsjónunum

**Sylverius Jacobsen**
*valevni Javnaðarflokksins í Eysuroynni*



**Politsk sjónarmið.**
Tað sum er áhugavert og spennandi í politikki er hetta, at ein fær loyvi til og kann verða við til at ávirka gongdina í okkara samfelag, sum jú er í stórari broyting júst hesi árini, ein broyting, sum sær út til at halda fram. Tí er umráðandi, at vit fáa tey røttu fólkini við teimum røttu hugsjónunum fram í fremstu røð, til frama fyri eini samfelagsskipan, sum er til gagns fyri alt fólkið. Ikki bara fyri einum parti av fólkinum, men fyri alt fólkið sum heild.

Javnaðarflokkurin hevur tað sjónarmið, at øll í samfelagnum eftir førimuni hava somu rættindi og somu skyldur. Øll skulu hava møguleika fyri at hava so góð livikor, sum okkara samfelagsskipan nú einaferð megnar at skapa fyri fólkið sum heild, bæði ung og gomul, kvinnur og menn, røsk og heilsubrekað.

**Nútímans samfelag**
Eit nútímans samfelag verður ofta mett útfrá, hvussu tey minst mentu og veikastu verða raðfest, tá talan er um livikor og lívsvirði. Verða tey sett aftast, so fær samfelagið vánaligt umdømið.

Javnaðarflokkurin hevur altíð roynt at hjálpt upp á korini hjá teimum veiku bólkunum, ja tað er eitt aðalsjónarmið í javnaðarhugsjónini. Ein veikur bólkur, sum verður størri og størri, eru jú tey gomlu. Teirra umstøður eru ikki alt ov góðar, og tí hevur javnaðarflokkurin sett sær fyri at bøta um livkorini hjá hesum medborgarum okkara.

Hvussu kann hetta gerast? Jú, eitt av høvuðsmálunum hjá javnaðarflokkinum er at styrkja fólkapensjónina og lyfta samhaldsføstu eftirlønarskipanina upp til eina munagóða skipan fyri allan arbeiðsmarknaðin.

Fólkapensiónin skal økjast bæði við at hækka upphæddirnar og við at prístalsregulerað alla pensjónina.

# Nú skeiðið er runnið, koma øll lyftini

**Bárður Nielsen**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Norðstreymoy*



Sambandsfloksins politikkur á almanna- og heilsuøkinum er lýstur í grein 7 í stevnuskrá floksins, sum er sent í hvørt hús.

Tað stendur púra greitt fyri øllum, at fullveldisssamgongan 1998-2002 hevur havt eina sera óhepna hond við at handfara hesi málsøki. À nærum øllum økjum hevur verið so lítið avrikað, at Føroyar eru komnar langt í afturhond, tá ið samanborið verður við okkara grannalond.

Hetta setir okkum í eitt ringt ljós, tí dygdin í einum vælferðarsamfelag verður í stóran mun mett eftir, hvussu samfelagið fer um teir veiku samfelagsbólkarnar.

Sambandsflokkurin hevur fyri langari tíð síðani ásannað, at eldraøkið er ein samfelagsuppgáva, tá ið familjan sjálv hevur gjørt tað, sum tey hava møguleikar fyri at hjálpa. Undir sambandslandsstýrinum 1980-84 vórðu bygd tvey ellis-og røktarheim (í Klaksvík og Runavík) og farið var seinasta árið undir at byggja tað triðja (Lágargarð). Tað fjórða var undir fyrireiking (Sandoy).

Sambandsflokkurin fer ikki at dýggja øll undir í lyftum, men flokkurin fer tá ið hann aftur kemur í samgongu at raðfesta eldraøkið í fremstu røð. Hann fer at halda fram við at skipa fyri útbyggingum á eldraøkinum, tað veri seg at byggja ellis- og røktarheim, sambýli, íbúðir hóskandi serliga til eldri.

Flokkurin fer at virka fyri víðari menning og útbygging av Heimarøktini.

# Skipanir og mannagongdir á almennum stovnum skulu gerast greiðari og effektivari

**Gunnvá Mortensen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Norðstreymi*



Hóast almenna fyrisitingin er vorðin størri og dýrari, hevur vanligi borgarin ikki fingið betri tænastu. Tí má almenna fyrisitingin endurskoðast.

Skipanir og mannagongdir á almennum stovnum skulu gerast greiðari og effektivari, soleiðis at borgarin fær ta tænastu hann hevur brúk fyri, tá hann hevur brúk fyri tí. Ein og hvør, ið hevur tað fyri neyðini, skal fáa virðiliga viðgerð. Eisini skal tað vera lættari hjá starvsfólki at vegleiða og hjálpa viðskiftafólki, tí muga heimildirnar eisini endurskoðast.

Harafturat er neyðugt, at gera meiri burturúr telduskipanum, fyri at fullnýta ta arbeiðsorku sum er.

Nýggja stýrisskipanarlógin hevði við sær, at vit fingu eina størri almenna umsiting. Fleiri vórðu sett í starv og fleiri stovnar vórðu skipaðir undir aðalstýri, hetta fyri at fáa eina betri tænastu, men vanligi borgarin hevur ikki merkt stórvegis bæta.

Tað, at stovnar verða lagdir undir aðalstýri, er ikki nøkur effektivisering, um málini verða viðgjørd á sama hátt sum frammanundan. Um leigan verður spard er avgreiðslutíðin akkurát tann sama, og enn kemur tað fyri, at fyrispurningar als ikki verða svaraðir. Ein møguleiki er, at stovnarnir virka enna sum stovnar, men bara undir somu lon. Okkurt stýri hevur líka nógvar arkivskipanir, sum tað vóru stovnar, og er ikki vorðið effektivari á tí økinum. Eitt er at leggja stovnar saman, annað er at broyta áralangar mannagongdir, hetta krevur hugburðsbroyting hjá starvsfólkinum, og kann ikki bara áleggjast teimum, uttan at tey verða tilin upp á ráð. Tað er nógv sum bendir á, at starvsfólk, ikki í nóg stóran mun, hava verið tikin upp á ráð í hesi samanlegging - tað kunnu vit gera betri.

Tað er ógvuliga umráðandi, at slíkar broytingar fara fram við samarbeiði ímillum politiska myndugleikan og tey, sum dagliga starvast hjá tí almenna, soleiðis at broytingin verður mennandi fyri báðar partar. Ikki minni umráðandi er, allatíðina at hava tørvin hjá vanliga borgaranum í huga, soleiðis at hann veruliga kennir, at endamálið er at tæna honum.

gunnva@post.olivant.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin



## VIÐMERKINGAR

# Vágafólk og flogvøllurin

**Tordur J. Niclasen**
*Valevni Miðfloksins í Eysturoy*



Hvønn týdning flogvøllurin hevur fyri Vágafólk- fyri alt føroya fólk - man fáur ivast um í dag.

Tí er tað sera harmuligt og átaluvert, at berur kleyvarskapur hevur hindrað eini neyðygar útbygging av flogvøllinum í Vágum.

Tað at fast samband nú er undir Vestmannasundi, fer uttan iva eisini at hava við sær, at "argumentið" at leggja flogvøll aðrastaðnis í landinum, man fara at hvørva og at tær kreftir, sum hava gingið á odda fyri at flyta vøllinu úr Vágum, munnu helst verða mundandi linkaðar.

Hjá mær sum vágamanni hevur tað verið ein fragd at sæð, hvønn týdning flogvøllurin hevur havt og hevur fyri fólkið har vesturi.

Tí harmar tað meg og hvørt einasta fólk í Vágum stórliga, at støðan viðvíkjandi møguligar útbygging av flogvøllinum tykist fastløst.

Hetta orsakað av tí skilaleysu og harðrendu støðu samgongan (fólkaflokkurin, tjóðveldisflokkurin og sjálvstýrisflokkurin) hevur sýnt í samráðingum við donsku stjórnina!!

Ná, men "vit skulu sjálvi byggja út" siga teir, samstundis, sum teir hava skorið blokkin við nærum 400 milliónum, uttan at spyrja føroya fólk. Við hvørjum skulu teir byggja út fyri ?

Umráðandi er, at síggja Føroyar sum eina heild og at virka fyri menning , eisini av tí, sum liggur uttan fyri meginøkið.

Flogvøllurin og útbygging av honum, er ein náttúrligur og neyðugur partur av hesi menning.

Hetta mál eigur beinanvegin eftir valið at verða tikið upp í samráðingum við donsku stjórnina.

At fjálga um flogvøllin og virka fyri eini neyðugari útbygging, er nakað sum eg framvegis vil arbeiða hart fyri!

Tí vil ein atkvøða til Miðflokkin eisini verða Vágoynni at gagni.

# Pyntað seg við leigaðum fjarðum!

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður og valevni fyri Sambandsflokkin í Suðurstreym*



Javnaðarfólk siga seg vera fyri fleiri leiguíbúðum og fleiri alternativum íbúðum. Kári Petersen og Elin Lindenskov skriva enntá, at "Javnaðarflokkurin ætlar at broyta mvg-lógina og lógina um rentustuðul, so íbúðarfeløg fáa rætt til mvg-frítøku og til rentustuðul."

Her pyntar Javnaðarflokkurin seg við leigaðum fjaðrum!

Sjálvur legði eg fram tvey lógaruppskot á ting. Annað var um broyting í mvg-lógini, so íbúðarfeløg skuldu fáa somu mvg-frítøku sum sethúsaeigarar. Hitt var um broyting í lógini um rentustuðul, so íbúðarfeløg skuldu fáa sama rentustuðul sum sethúsaeigarar.

Atkvøðugreiðslan er at finna á heimasíðuni hjá løgtinginum — www.logting.fo tingmál nummar 58 og 59 á ár (tingáriÝ 2001). Ímóti broytingunum í mvg-lógini vóru Katrin Dahl Jakobsen, Kristian Magnussen, Helena Dam á Neystabø og allir hinir javnaðarmenninir, ið vóru á fundi, uttan Henrik Old. Ímóti broytingunum í rentustuðulslógini vóru aftur Katrin Dahl Jakobsen, Kristian Magnussen, Helena Dam á Neystabø og allir hinir javnaðarmenninir, ið vóru á fundi. Her hongur ikki saman hjá Javnaðarflokkinum.

Tí skal ljóða ein ávaring: Javnaðarfólk, ið siga seg vilja alternativum íbúðarmøguleikum og leiguíbúðum væl, pynta seg við lántum fjaðrum.

Fráfarandi samgonga setti sær fyri at skulu fara undir ein miðvísan íbúðarpolitikk. Orðini vóru soljóðandi:

"Ein greiður íbúðarpolitikkur verður raðfestur. Alternativir íbúðarmøguleikar skulu skapast kring landið í samstarvi millum landið og kommunurnar, bæði sum kommunalar/privatar leiguíbúðir, lutafelagsíbúðir, eldraíbúðir, íbúðir til rørslu- og menningartarnað, ungdómsíbúðir o. a."

Annita á Fríðriksmørk og Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum hava havt fýra ár at fáa hetta umsett til veruleika. Fýra ár. Vegna Sambandsflokkin setti eg fram uppskot um at javnseta alternativar íbúðir og leiguíbúðir við verandi sethús, tá tað ræður um mvg-frítøku og rentuískoyti.

Men hesi bæði atkvøddu ímóti. Á heimasíðuni hjá løgtinginum sæst, at øll tjóðveldisumboðini vóru ímóti. Annita hevur grundgivið støðu sína við, at tað ikki er nakar yvirornaður íbúðarpolitikkur, herímillum ongin greiður kavaruddingarpolitikkur.

Álvaratos. Politikkurin hjá okkum Sambandsmonnum er greiður: øll eru líka fyri lógini. Tá vit sethúsaeigarar fáa mvg-endurgjald og rentuískoyti, so skulu sjálvsognarstovnar, ið byggja leiguíbúðir, til alment gagnligt endamál eisini fáa tað. Har eru tjóðveldisfólk gliðin í politisku hálkuni. Tíbetur kann veljarin tann 30. apríl við eini yvirornaðari politiskari kavarudding koyra slíkar politiskar kavamenn burtur.

Partvís var mótstøðan helst grundað á, at í Havnini eru vit komin langt ávegis við einum alternativum projekti. Tað hevði lætt munandi um mánaðarligu leiguna, um tingið gjørdi tey leigandi líka fyri lógini og gav teimum somu viðferð sum sethúsaeigarunum. Men partvís av øvund móti Havnini vóru summi tingfólk ímóti, hóast reglurnar greitt vóru orðaðar soleiðis, at tað var líka til at fara undir íbúðarbygging Heima á Sandi ella í Klaksvík.

Vónandi verður tað eitt øgiligt fjaðrarok, tá veljarin setur hesi skamleysu fólk uppá pláss.

# Skilnaður millum alment og privat

**Annfinn Brekkstein**
*valevni sambandsflokksins í Suðurstreymoy*



Mistøkini frá tiltiknu 1980 árunum skulu ongantíð verða endurtikin. Landskassin skal aldrin aftur gerast eitt sjálvtøkuborð hjá nøkrum fáum spekulantum og ódugnaligum vinnulívsmonnum, sum ikki megna at reka síni virki uppá vanliga marknaðarbúskaparligar fortreytir.

Greiður skilnaður og vatntætta skottið millum vinnulívið og tað almenna eigur sostatt altíð at vera eitt av hjartamálum floksins.

Vinnan skal hvíla í sær sjálvum, men eigur hinvegin at fáa greiðar karmar og góð kor.

# Kapuuum!

**Magni Laksáfoss**
*Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Og teir rullaðu stóra tangan við brennievninum út á vøllin, settu seg á hann og tendraðu í brennievnið. Hini stóðu bara ovfærd og hugdu at meðan tangin brast við einum buldri. Og við tanganum og brennievninum brast dreymurin um spennandi ferðina sum øll atlæðu sær við á.

Vit føroyingar hava sett okkum eitt mál fyri, vit ynskja at fáa okkum ein sjálvberandi búskap. Ein sjálvberandi búskapur gevur okkum frælsið til at gera júst tað okkum lystir. Tað gevur okkum frælsið til at velja tað vit vilja hava fyri okkara land og tjóð. Man kann siga at vit ynskja at byggja eina rakett, sum vit kunnu fara út í rúmdina við, ferðast víða og síggja og uppliva nýggj ting. Øll hava vit hug at verða við á ferðini og uppliva tey tingini sum standa fyri framman.

Vit hava sett okkum málið fyri - rakettin skal byggjast, so vit kunnu fara avstað. Vit eru enn ikki heilt samd um hvar leiðin skal ganga, men vit ynskja øll at byggja rakettina, so vit kunnu fara avstað tá hon einaferð er klár.

**Summi hava ikki tol**
Í seinastuni hava teir mest ótolnu av okkum mist tolið. Teir hava ikki stundir at bíða eftir at rakettin gerst liðug. Teir eru farnir út á vøllin við nógvum tonsum av brennievni og ætla at seta seg á tangan og tendra í. "Buldrið skal nokk lyfta okkum upp í rúmdina!", siga teir. Øll síggja vit hvar tað ber, men ringt er at fáa teir at skilja, at hatta nokk ikki er mátin at gera tað upp á. Vit kundu sagt: "Gott er! Lat teir fara, so fáa vit onnur arbeiðsfrið!" Men tað kunnu vit ikki, tí vit hava brúk fyri øllum góðum kreftum til at byggja rakettina - og annars so hava vit faktisk eisini brúk fyri brennievninum fyri at fáa sent rakettina avstað, tá hon um ikki so langa tíð verður liðug.

**Mugu geva tol**
Tað nyttar ikki at futta alt brennievnið av til onga nyttu. Tað nyttar heldur einki at brúka allar kreftirnar upp á at skeldast um hvar leiðin skal ganga, áðrenn vit eru komin nakran veg við at fáa ein sjálv-berandi búskap. Vit mugu øll arbeiða saman um at byggja búskapin upp, so vit seinni kunnu semjast um hvar leiðin skal ganga. Vit skulu nokk gerast samd um leiðina tá tað kemur til stykkis! Lat okkum kjakast um leiðina í frið og náðum meðan vit í felag byggja búskapin upp. Uttan ein góðan og sterkan búskap fara vit ongan veg, og vit ynskja jú øll at sleppa avstað.

**Øll skulu við**
Ferðin, vit skulu við rakettini, er ein felags ferð. Øll skulu við. Tað nyttar ikki at skunda sær so nógv, at vit ikki hava stundir til at geva øllum góðar sømdir á ferðini. Har skal vera rúm fyri teimum gomlu. Har skal vera rúm fyri teimum ungu. Og øll skulu vit liva á ferðini. Øll skulu vit hava mat og klæði. Helst skulu vit hava fyrireika okkum so væl, at rakettin kemur væl avstað. Einki er vunnið um hon spreingist so skjótt sum hon er komin upp í luftina, og alt dettur niður av himli í smáðum stykkjum. Nei, vit mugu geva okkum stundir til at fáa fyrireika ferðina so væl sum gjørligt.

**Heildarætlan**
Lat okkum í felag fara undir at byggja búskapin. Byggiætlanin skal eita ein heildarætlan, tí uppgávan er so umfatandi og torfør, at tað nyttar ikki at einstøku lutirnir ikki passa saman. Alt skal vera ein væl gjøgnumhugsað heild, sum ger, at vit øll kunnu føla okkum trygg á ferðini, njóta túrin og ikki liva í ræðslu um búskapurin fer at bera ella bresta.

Lat okkum saman byggja búskapin upp til ein sjálvberandi búskap!